# Brutu rútar í Klaksvík

Fríggjakvøldið fekk løgreglan í Klaksvík fráboðan um, at onkur hevði verið og gjørt seg inn á Granskingardepilin í Klaksvík.

Granskingardepilin heldur til í gamla bygninginum hjá løgregluni í Klaksvík, og har vóru fleiri rútar brotnir, sigur sýslumaðurin.

Eingin er heilt neyvt greiður yvir, nær tilburðurin er farin fram, men av løgreglurstøðini í Klaksvík frætta vit, at hann helst er farin fram millum klokkan fýra seinnapartin og klokkan tíggju á kvøldi.

Sýslumaðurin í Klaksvík metir at talan er um dreingjalótir.

# Innbrot í Tórshøll

*Óbodnir gestir hava vóru í Tórshøll fríggjanáttina og teir fóru avstað við 17 túsund krónum*

Fríggjamorgunin fekk løgreglan í Havn boð um, at tað hevði verið innbrot í Tórshøll fríggjanáttina.

Gestirnir vóru farnir við 17 túsund krónum í reiðum peningi og við fýra fløskum av brennivíni, sigur Bergleif Brimvík, leiðari á kriminaldeildini á støðini í Havn.

Løgreglan hevur enn ikki funnið út av nær innbrotið er framt, men tað er hent eftir afturlatingartíð hóskvøldið, og áðrenn starvsfólkið kom til arbeiðis fríggjamorgunin. — Tjóvarnir eru farnir inn í sunnara enda. Teir hava brotið sær veg gjøgnum eina hurð, sum er í tí endanum, greiðir Bergleif frá.

Hóast kriminalløgreglan enn ikki hevur tikið nakran á hondum, so hava teir kortini ein illgruna um hvørjir — ella hvør — ótangarnir eru, leggur Bergleif Brimvík afturat

# Rendi á og stakk av

*Talan er ikki um somu søgu, sum fyri kortum, men enn ein bilførari, sum rendi út av vegnum við Stykki, royndi at sleppa til rýmingar. Tað miseydnaðist*

Leygarmorgunin fekk løgreglan í Havn boð um eitt ferðsluóhapp, sum var hent á Landsvegnum við Stykkið.

Ein bilur var farin niðan av vegnum, haðani hann varð slongdur upp aftur á vegin, har hann stóð. Bilurin hevði fingið rættiliga stóran materiellan skaða, sigur vakthavandi á støðini í Havn.

Bilførarin, ein ungur maður, var einki fegin um at tosa við løgregluna, so hann slapp sær til rýmingar, eins og tann seinasti gjørdi, sum var fyri ferðsluóhappi við Stykkið fyri kortum.

Hesin førarin hevði ikki »eydnuna« við sær á sama hátt, sum hin fyrri, tí tað eydnaðist løgregluni at finna fram til mannin, sum varð tikin við á støðina, sigur vakthavandi. Bilførarin verður ákærdur fyri at koyra ávirkaður og fyri at stinga av frá ferðsluóhappi. Tað hevur bilførari ikki loyvið til, sambært ferðslulógini.

# Nóg mikið av grind

*- Verður rópt grindaboð, so verður hon dripin sum vanligt, men alt verður flutt av oynni, sigur Karl Johansen, sýslumaður í Klaksvík*



Seinastu tíðina eru norðoyingar vælsignaðir við fleiri grindum. Tann seinasta var eisini so mikið stór, at hon fylti goymslurnar, og tí heldur sýslumaðurin, at nú er nóg mikið. Tað merkir, at nú verður ikki meira grind til norðoyingar í hesum umfarinum.

Men tað merkir kortini ikki, at tað er sett forboð fyri grindadrápi í Norðoyggjum.

- Nei, men verður rópt grindaboð, so verður hon dripin og flutt av oynni, sigur sýslumaðurin.

Tað er eftir hansara fatan tekin um, at tað er nóg mikið av grind, tá tey, sum fáa, fara til Havnar at selja ístaðin fyri at goyma til egna nýtslu, heldur hann, og so er rættast at lata onnur fáa heldur enn at leggja inn undir seg.

- Tað er eitt sindur keðiligt, tá tað verður selt, tí tá hava nøkur fingið ov nógv, meðan onnur einki hava fingið. Tað er eitt sindur óheppið, tí tað eru øki í landinum, sum av náttúrligum áum, ikki fáa so nógva grind, sum vit til dømis fáa í Norðoyggjum, sigur Karl Johansen.

Hann nevnir Eysturoynna, sum tað eina dømi, og høvuðsstaðin sum hitt. Og tað er eingin loyna, at tað er nógv longri millum grindirnar í Eysturoynni og Havnini, enn tað til dømis er í Norðoyggjum, Vágum ella í Suðuroynni.

- Og kemur ein grind — ella tvær — so verður farið í grind sum vanligt, men tað verður beint aðrastaðni at býta. Eingin ivi um tað, sigur Karl Johansen, sýslumaður í Klaksvík.

So er bara hjá meginstaðarføroyingunum at vóna, at tað skjótt aftur verða rópt grindaboð í Norðoyggjum. Har er jú fult frammanundan.

# Russar sendir av landinum

*Tá Norrøna fór av Havnini, við kós móti Bergen, í gjáramorgunin, vóru tveir russiskir ferðamenn umborð. Teir royndu at sleppa sær ólógliga inn í Ísland*

Tað var tá Norrøna kom úr Íslandi fríggjamorgunin, at løgreglan tók ungu russisku menninar. Annar er 23 ára gamal og ættaður úr Sibiria, meðan hin er 28 ára gamal og úr Tajikistan.

Bergleif Brimvík, leiðari á kriminaldeildini greiðir frá, at teir báðir eftir øllum at døma eru komnir við Norrønu úr Bergen í síðstu viku. Teir eru ikki komnir í land í Føroyum, men farnir beina leið til Íslands, har teir ætlaðu sær í land.

- Men av tí at teir ikki høvdu innferðarloyvið til Íslands, var einki at gera. Teir vórðu tí sendir sama veg, sum teir vóru komnir, greiðir Bergleif frá.

Russisku ferðamenninir høvdu kortini eina aðra søgu enn íslendska løgreglan. — Teir søgdu, at teir vóru komnir úr Istanbul við farmaskipi, men ta søguna fingu teir ongan at trúgva uppá, sigur Bergleif.

Ein høvuðsorsøk til tað var, at løgreglan í ferðagóðsinum hjá øðrum russaranum fann ein videoupptakara, sum var horvin úr handlinum umborð á Norrønu, á veg úr Bergen í síðstu viku. — Hvussu hann annars skal verða endaður har, er ilt at siga, sigur Bergleif.

Av tí at russisku ferðamenninir ikki høvdu innferðarloyvið til Føroya heldur, vóru teir settir umborð á Norrønu aftur, tá hon fór til Bergens í morgun. Hagani komu teir og hagar verða teir sendir aftur, tá so er. Áðrenn teir fóru greiddu russisku ferðamenninir løgregluni frá, at teir høvdu søkt um friðskjól í Íslandi. Um tann søgan er røtt ella skrøgg, visti Bergleif kortini ikki.

# Væleydnaður landsdystur

*Løgreglan í Runavík fegnaðist eisini eftir landsdystin móti Slovenia, men tað var eisini tí, at alt hevði gingið sum eftir ánni, sigur vakthavandi*

Størsti trupulleikin hjá løgregluni í Eysturoynni plagar at vera ferðslan til og frá Svangaskarði, tí har er bert tann eini vegurin út á Toftir. Tí plagar tað at taka sína tíð, at sleppa avstað aftur aftan á dystin og dagurin í gjár var einki undantak í so máta, sigur vakthavandi á støðini í Runavík.

- Men tá tað er sagt, so skal dentur leggjast á, at tað gekk sera væl. Ferðslan gekk kanska eitt sindur seint fyri seg, men hon gekk væl. Har var einki at seta fingurin á yvirhøvur, sigur vakthavandi.

Hann greiðir annars frá, at løgreglan, sum eisini er til staðar tá dystur er á Svangaskarði, mátti taka sær av einum manni, sum hevði fingið ov nógv innanborða. — Tað er keðiligt, at fólk ikki duga sær hógv, tá tey drekka og fara til landsdyst, so tí mátti eg sita her og ansa eftir drukna manninum, sigur vakthavandi, sum ikki dylir fyri, at hann heldur kundi hugsa sær at verið á Svangaskarði og sæð skotið hjá Øssuri.

Drukni maðurin varð lagdur í ein kliva á støðini, og har slapp hann at liggja til einaferð út á kvøldið, tá hann var vorðin so mikið edrúur, at løgreglan kundi seta hann út á gøtuna.



## Ítróttur

e-mail: jakup@sosialurin.fo
Sosialurin - Box 76 - 110 Tórshavn - Tlf. 31 18 20 - Fax 31 47 20

**Umrø›a av 2. deild ver›ur í bla›num í morgin**

# Tveir á Tórsvølli og tveir á Toftum

*Í FSF umhugsa teir at spæla landsdystirnar mitt í viku í høvu›sta›num og á Toftum í vikuskiftunum*

FSF bossurin er ikki akkurát typan sum leypur upp í loft, tá ta› gongur væl. Hann er jar›bundin, og ta› er ein vælsignaur eginleiki. Tí hann hevur vi› sær, at tú heldur ikki fert í kjallaran, tá ta› gongur minni væl. Ta› hevur ta› ofta gjørt hjá landsli›num.

Men Torleif Sigur›sson duldi ikki sunnudagin, at hann var væl nøgdur vi› úrsliti›:

– Vit fóru upp í altjó›a fótbólt fyri at fáa naka› burturúr. Í komandi viku ver›a ta› tíggju ár sí›ani fyrsta dystin í Landskrona. Tá vunnu vit 1–0 á Eysturríki. Sí›ani tá hevur ta› onkunti› veri› buldraligt. Vit hava ongantí› sí›ani fingi› stig í fyrsta dystinum í einari undankapping. So hetta var hugaligt.

Men ta› kostar tær eitt sindur?

– Ta› er rætt, at í sáttmálanum vi› spælararnar stendur, at teir fáa f‡ra túsund krónur í part fyri ein javnleik. Venjarin fær eisini sams‡ning fyri stigini, so vit kunnu siga, at javnleikurin í dag kostar okkum smáar 100 túsund krónur. Men ta› mugu vit liva vi›.

Ta› kann gerast ein d‡rur umgangur?

– Tú hugsar um, at um vit vinna, so skulu vit rinda meiri. Ta› er rætt, at fyri hvønn sigurin fáa spælararnir átta túsund krónur í part. Ta› rinda vit fegnir. Vit halda eisini, at inntøkumøguleikarnir áttu at veri› størri, tá ta› gongst væl hjá landsli›num. Vónandi fara vit at síggja ta› aftur í stu›li frá vinnulívi og fyritøkum.

Í dystarskránni eru Atlantsflog og Vestlax stu›lar hjá landsli›num:

– Atlantsflog er huga› at halda fram saman vi› landsli›num. Vestlax er n‡tt í hesum høpinum. Vit eru sera fegnir um og takksamir fyir, at ein framlei›slu– og útflutningsfyritøka í alivinnuni hevur s‡nt landsli›num áhuga. Vónandi fáa vit eitt gott og fruktagott samstarv vi› teir.

**Tveir á hvørjum sta›i**

Hesa fer› var fyrsti landsdysturin á Svangaskar›i sí›ani í juni í fjør. Tá var› spælt á Toftum 5. ímóti Skotlandi og 9. ímógi Bosnia. Sambært FSF formanninum kann ta› væl hugsast, at ta› í framtí›ini ikki fer at ver›a spælt vi› so stuttum millumbili á sama vølli:

– Vit hava tveir vallir, sum vit í FSF ætla at brúka til landsdystir. Komandi ár eru tveir dupult dystir á skránni. Í juni koma Jugoslavia og Sveis henda vegin, og fyrst í september koma Luksemburg og Russland. Vit hava ikki tiki› nakra avger›, men vit umhugsa, at dystirnir, sum ver›a mitt í viku, skulu spælast á Tórsvølli, og at teir, sum ver›a í vikuskiftinum skulu spælast á Toftum.

Jugoslavia og Russland hava bæ›i spælt á Toftum, men um hugsanin hjá Torleifi Sigur›sson og FSF gerst veruleiki, so skulu tey bæ›i hægst flokka›u londini í undankappingarbólki eitt spæla á Tórsvølli. Dysturin ímóti Jugoslavia ver›ur mikudagin 6. juni, og tann ímóti Russlandi ver›ur mikudagin 4. september. Sveis skal so spæla á Svangaskar›i leygardagin 2. juni og Luksemburg leygardagin 1. september.

Í komandi mána› fer landsli›i› út at fer›ast. Leygardagin 7. oktober skulu teir spæla í Zürich í Sveis, og mikudagin 11. oktober skulu teir spæla í Beograd í Jugoslavia

JH



*Sambært FSF formanninum, Torleifi Sigur›sson, ætlar FSF komandi ár at b‡ta landsdystirnar javnt millum Tórsvøll og Svangaskar›*

# Uni hóttir nú av álvara Toda

*Landsli›svenjarin vir›ismetir dygdirnar at vera á rætta plássinum røttu løtuna, og hann heldur at máli› hjá Øssuri Hansen kann sammetast vi› øll tey, sum eru at síggja í útlendsku sjónvarps rásunum*

Uni Arge skora›i fyrra máli› sunnudagin, og nú er hann rættuliga farin at hótta stø›una hjá Toda Jónsson sum toppskjútti á føroyska li›num. Todi Jónsson hevur skora› níggju mál. Hann skora›i seinast, tá landsli›i› á venjingarleguni í Spania fyrst í árinum tapti 3–2 ímóti Íslandi. Uni Arge hevur skora› sjey mál. Hann hevur skora› eitt anna› mál í ár. Ta› var tá Føroyar 26. apríl vunnu 1–0 í Liktinstein. Ta fer›ina var Uni Arge ikki ímillum teir fyrstu ellivu, men hann kom á vøllin í 2. hálvleiki.



*Uni Arge er nú av álvara farin at hótta Toda Jónsson, sum annars hevur veri› toppskjútti hjá føroyingum í altjó›a høpi*

Mynd: Álvur Haraldsen

Allan Simonsen hevur ofta havt Una Arge sitandi á beinkinum inntil í 2. hálvleiki. Tær seinastu fer›irnar hevur hann veri› vi› frá fyrsta bríksli, og sunnudagin var ta› ein av fáu fer›unum, at Uni hevur spælt allar 90 minuttirnar.

– Eg havi sagt ta› vi› Una, at eg vildi ynskt, at hann hevur lyndi til vi›hvørt at hvørva úr spælinum eina fitta løtu. Men eg veit, at Uni hevur sera gó› evni at vera á rætta sta›num røttu løtuna. Ta› eru málini, sum telja, og ta› er t‡dningarmiki› at hava spælarar á li›num, sum aftur og aftur skora. Fyri stuttum var eg í Íslandi og hugdi at føroysku landsli›smonnunum, og tá fekk eg sta›fest, at Uni Arge, sum eisini skora›i ta fer›ina, er væl fyri.

Øssur Hansen javna›i sunnudagin til 2–2 vi› einum meistarligum frísparki. Allan Simonsen var ikki so ovfarin av, at bólturin fór í máli›:

– Hatta er spesialiteturin hjá Øssuri. Ímóti Danmark var hann óheppin, tá hann úr somu stø›u sendi fríspark upp um manngar›in og ni›ur innanfyri stólparótina. Tíverri fyri okkum megna›i Peter Schmeichel akkurát at bjarga. Hesa fer› sat bólturin høgt í málinum, og ta› kom væl vi›. Máli› var av einum sovornum klassa, at ta› væl tolir at ver›a sammett vi› frísparksmálini, sum aftur og aftur eru at síggja á ymsu sjónvarpsrásunum, heldur landsli›svenjarin.

Øssur Hansen hevur eina fer› á›ur veri› málskjútti á landsli›num. Ta fer›ina var eisini talan um ein dey›bólt. Øssur skora›i upp á brotsspark ni›ri á Malta 30. apríl í 1997.

– Øssur er væl fyri. Hann er ein av mest ey›s‡ndu spælarunum í føroysku landskappingini, og ta› sást aftur á landsli›num, at hann hevur stórt sjálvsálit, sigur Allan Simonsen.

Føroyska landsli›i› hevur í 68 altjó›a skrásettum landsdystum skora› 42 mál. Merkisvert er ta›, at í trimum teimum sí›stu dystunum á Svangaskar›i hevur landsli›i› skora› fimm mál.

JH